


# THOR valt nøvnini til nýggju skipini

Jan Müller

24.05.2014 - 12:39

Oljan >

Frálandareiðaríið Thor í Hósvík er aftur á kós móti heimshøvunum, hesaferð við tí fyrsta av fýra skipum, sum fyritøkan letur byggja í Turkalandi. Fyrsta skipið verður latið eigarunum í september, og nú tað nærkast tí fyrsta skipadópinum, hevur reiðaríið gjørt av at navngeva tey fýra skipini. Felagið er farið aftur í norrønu gudalæruna at finna nøvn til nýggju skipini.

Nøvnini, sum Thor hevur valt til t ey fýra nýggju skipini, ið hava fingið 10 ára sáttmála at gerast veitingarskip í seismikkvinnuni, eru: **THOR MAGNI – THOR MODI – THOR FRIGG – THOR FREJA**

THOR – høvuðsnavnið hjá øllum skipunum - var tann orkumikli gudurin í norrønu gudalæruni. Og tað eru júst í ár 20 ár liðin, síðani hetta størsta føroyska frálandareiðaríið varð stovnað.

Thor, sum hevur heimstað I Hósvík, er ein støðugt vaksandi fyritøka við nógvum árum á baki innan fiskivinnu og offshore.

Thor hevur í dag 30 skip, har helvtin virkar í fiskivinnuni, og hin helvtin í offshorevinnuni.

Í løtuni hevur THOR fýra skip í ordra, ið verða skræddaraseymað til offshorevinnuna. Tvey av teimum verða liðug í 2014 og hini bæði í 2015.

THOR arbeiðir kring allan heimin, og á THOR leggja tey stóran dent á at hava og umboða bestu starvsfólk og manning verður sagt í tíðindaskrivi. THOR Offshore er ISO9001, ISO14001, OHSAS18001, ISM og Achilles góðkent. Vinnumálið hjá THOR er: Trygdin fremst.